

Per Ung hevur kannað staðið á Heygum í Vestmanna, har standmyndin av Ólavi á Heygum skal standa. Har fer hon at standa væl, heldur hann.

MYND: JENS KRISTIAN VANG

mannakroppinum, og tað einasta, eg tími at gera, er standmyndir. Eg vil ikki broyta samfelagið við míni list, men siga søguna um mannakroppin við at yvirdríva formarnar, so ljós og skuggar sleppa at spæla frítt, og fólk merkja tað, tey síggja. Mítt mál er at fáa lív í deytt tilfar, sigur Per Ung.

Yngri myndahøggarar hava mangan spurt hann, hvat krevst fyri at gerast ein góður myndahøggari. Um teir væntaðu at fáa eina vegleiðing um, hvussu standmyndir skulu gerast, gjørdust teir ivaleyst vónbrotnir, tí Per Ung hevur eittans svar upp á tann spurningin. Um tú ikki kanst lata vera, so hevur tú ein kjans. Tað snýr seg um at hava hug.

– Eg fór á listaskúla sum 18 ára gamal, og sum 21 ára gamal vann eg eina kapping, sum gav mær eina ávísa umrøðu. Men tey næstu 20 árini vóru hart arbeiði við ongum pengum og nógvum stríði. Ikki fyrr enn eg var farin um tey 40, kundi eg liva nøkulunda av míni list. Í dag livi eg væl og kæri ikki mína neyð, sigur tann 77 ára gamli norski myndahøggarin.

## Universella listin

Meðan bilarnir strúka framvið í Vágsbotni, og skipini hvíla við Molan, fer hann at hugleiða um meiningina við at skapa list. Menniskjan fekk fyri mongum túsund árum síðan hug at tekna seg sjálva, og tað fer hon at halda fram at gera, tí hon hevur áhaldandi tørv á at avmynda og skoða seg sjálva, eins og grikkar gjørdu, tá teir teknaðu sínar egnu skuggar í sandin.

– Vit ferðast upp á mánan, men vit fara altíð at forma okkum sjálvi í leiri. Standmyndin gevur okkum eina visuella uppliving av nøkrum, sum er ítøkiliga til staðar, og sum vit skilja. Kanska er tann klassiska standmyndin ikki nýskapandi, eins og avantgardisman sigur seg vera, men hon er universell og verður standandi sum góðska, sama hvørji rák eru uppi í tíðini, sigur Per Ung.

Nógv bendir á, at klassiski stílurin og evnini hjá Per Ung at fáa deytt tilfar at liva fara at síggjast aftur í standmyndini av Ólavi á Heygum, tí gipsmodellið, sum hann hevur gjørt, ímyndar ein hábærsligan mann á fastari grund, ið virkar sera nærverandi, tí eitt vindblak fær klæðini at liva. Og soleiðis fer Ólavur á Heygum at standa og líta út yvir Heyganes.

– Eg fegnist nógv um at vera sloppin at gera standmyndina av Ólavi á Heygum, og eg má siga, at Føroyar eru inspirerandi at uppliva. Tit eru tættari knýtt at søguni enn norðmenn og virðismeta tað, sum fólk hava avrikað. Eitt skilji eg kortini ikki, og tað er, at ongin standmynd av Williami Heinesen er at síggja her. Átti hann ikki at fingið eina standmynd eisini, spyr Per Ung at enda.



Ólavur á Heygum í stavnhettu og sjóstúku. Eftir hesi myndini verður standmyndin gjørd.

### FAKTA **PER UNG**

**Føddur:** 1933
**Bústaður:** Oslo
**Starv:** Myndahøggari
**Útbúgving:** Statens Kunstakademi 1952-55 við Per Palle Storm sum lærumeistara.
Hevur vunnið fleiri kappingar innan myndahøgging